# Petur Anfinn og Eilif føroyameistarar

**Leygardagin var FM-finalan fyri pør í bridge avgreidd, og vinnarar gjørdust Petur Anfinn Johannesen og Eilif Petersen**

TÍÐINDASKRIV



Leygardagin 12. mars varð finalan fyri pør í bridge leikt í Bridgehúsinum í Havn.

Kappingin varð skipað sum ein barometur-kapping, soleiðis at ein kundi fylgja við eftir hvørt umfar, hvussu tað gekst. Spæld vóru 76 spøl, ið tilsamans tóku áleið 12 tímar at avgreiða.

Jógvan Juul Rasmussen og Jóna Gruntveit gjørdu eitt megnararbeiði at fáa kappingina at ganga so væl sum gjørligt, og eiga tey stórt rós fyri hetta.

Kappingin var mett at vera ein tann javnasta í nógv ár, og eisini var mett, at fleiri pør høvdu møguleika at vinna. Kappingin gjørdist eisini sera spennandi, og vinnarin var ikki funnin, tá ið síðsta umfar byrjaði. Fleiri pør skiftust um leiðsluna. Heðin og Jóannes Mouritsen vóru í toppinum allatíðina, og vóru tað kanska tey flestu, ið væntaðu, at teir fóru at vinna kappingina. Men Petur Anfinn Johannesen og Eilif Petersen, ið eisini lógu heilt frammi, vildu tað øðrvísi. Við røttum stríðsanda og góðum spæli, eydnaðist tað teimum í síðsta umfarinum at koma upp á fyrsta plássið og vinna FM- heitið fyri pør 2005, beint framman fyri Marner Joensen og Árna Dam, ið hegnisliga høvdu klatrað heilt upp í toppin.

Spæl
5
♠ 32

N/NS
♥ T6

♦ 5432

♣ EKT94

♠ D987

♠ EKT5

♥ 8
♥ B542

♦ EDB87
♦ K96

♣ B87
♣ 63

♠ B64

♥ EKD973

♦ T

♣ D52

Hendan 4 sparin vóru tað ikki fleiri pør, ið funnu. Her síggja vit hvussu Bogi Simonsen og Símin Lassaberg meldaðu 4 spar móti Oddmar Danielsen og Einar Ellingsgaard.

| N | E | S | V |
|---|---|---|---|
| P | p | 1hj | 2rút |
| 2hj | Dbl1) | p | 2sp |
| p | 4sp | a.p | |

1) Lovar 4 lit í spar og fit til rútara.

**FM MIX-PØR**

Leygardagin 2. apríl verður árliga FM-Mix Pør leikt í Bridgehúsinum í Havn. Kappingin byrjar kl: 10, spæld verða umleið 40 spøl, ið verða uppgjørd við barometur, soleiðis at ein kann fylgja við, hvussu tað gongur eftir hvørt umfar. Tað eru teir báðir, Rói á Røgvu Joensen og Heðin Mouritsen, ið skipa fyri kappingini.

# Skerd svimjistevna á Toftum

**Fríggjakvøldið og leygardagin skipaði svimjifelagið FLOT fyri árligu svimjistevnuni á Toftum.**

TÍÐINDASKRIV

Veðrið var sum kunnugt vánaligt, og hetta hevði við sær at einans eysturoyarfeløgini og HS hættaðu sær at møta við teimum yngstu, fríggjakvøldi. Ægir kom afturat leygarmorgunin, meðan VS fyrst møtti eftir døgverða leygardag, við einans trimum svimjarum.

Stevnan gekk tó væl, og var úrslitið hetta:

**Bólkur 1, svimjarar fødd-ir í 1996 og seinni (sum var bólkurin ið svam fríggjakvøldið)**
1) Reki: 10 gull, 7 silvur, 5 bronsu
2) FLOT: 2 gull, 2 silvur, 1 bronsu
3) FS: 2 silvur, 5 bronsu

**Bólkur 2, svimjarar føddir í 1994-1995 (leygarmorgunin)**
1) FS: 5 gull, 5 silvur, 3 bronsu
2) Reki: 5 gull, 4 silvur, 3 bronsu
3) FLOT: 2 gull, 1 silvur, 5 bronsu

**Bólkur 3, svimjarar føddir í 1992-1993 (leygardagin)**

1) HS: 10 gull, 2 silvur, 2 bronsu
2) Ægir: 2 gull, 1 silvur, 3 bronsu
3) Skeggjar: 1 gull, 1 silvur, 3 bronsu

**Samlaða heiðursmerkjabýtið varð:**

1) Reki: 15 gull, 11 silvur, 8 bronsu
2) FS: 5 gull, 7 silvur, 9 bronsu
3) FLOT: 4 gull, 7 silvur, 9 bronsu
4) Ægir: 1 gull, 4 silvur, 1 bronsu
5) Skeggjar: 1 gull, 2 silvur, 3 bronsu
6) VS: 2 silvur, 2 bronsu

Nú er svimjiárið farið at halla, og næsta stevna er tí eisini tann seinasta hjá teimum yngstu svimjarunum, tá ið teir um mánaðarskiftið apríl/mai fara at kappast um smáunglingameistaraheitini. Bólkur 3 kann tó eisini luttaka á HS-stevnu 2. og 3. apríl, áðrenn unglinga-meistarakappingina í apríl.

# Tvær bronsur til ÍSB

Føroysku borðtennisleikararnir, sum um vikuskiftið luttóku í kappingini um íslendska meistaraheitið í borðtennis fyri brekað, stóðu seg væl.

Serliga vóru tað kvinnurnar, ið royndust væl. Maurenn Garðshamar vann bronsu í einmansleiki í opna bólkinum, og í tvímansleiki vunnu Maureen Garðshamar og Unn Mortensen eisini bronsu.

Umframt tær báðar luttók eisini Tórður Jacobsen úr Føroyum.

**tn**

# Átta kappast um FM í billard

TÍÐINDASKRIV

Tað er nú greitt, hvørjir teir átta eru, sum skulu kappast um føroyameistaraheitið í billard fyri einstaklingar í Klaksvík komandi vikuskifti.

Kvalifiseringsumfarið varð spælt leygardagin í Klaksvíkar Klubba, Havnar Klubba og í Kagganum. Av teimum fimtan spælarunum hava hesir spælt seg í finaluumfarið:

Krisjan Suni Høgenesen, Sonhard Johannesen og Ólavur Kjølbro úr Klaksvíkar Billardfelag.

Bjarni Skaalum, Jan Müller og Heimir Ottoson úr Kagganum.

Og Carsten Hansen úr Havnar Klubba.

Haraftrat luttekur verandi føroyameistari Henrik Petersen úr Havnar Klubba.

Klaksvíkar Billardfelag og Billardsamband Føroya eru vertir fyri FM-kappingini í ár. Fyri at geva almenninginum størri innlit í billardspælið verður Klaksvíkar Klubbi opin fyri almenninginum fríggjadagin og leygardagin. Eisini verða dystirnir vístir á stórskíggja í felagshølunum.

Steinbjørn í Dali, formaður í Billardsambandi Føroyar sigur, at áhugin fyri billardítróttini er nógv minkaður seinastu árini. Tí vilja teir við at loyva almenninginum at síggja finaluumfarið í Klaksvík komandi vikuskiftið geva fólki ein møguleika at síggja føroyskt billardspæl, tá tað er best. - Eg vóni, at henda kappingin kann fáa onkrar unglingar og onnur við at fáa eyguni upp fyri spælinum, sum avgjørt ikki stendur aftanfyri so nógvar aðrar ítróttargreinar. Formaðurin í Billardsambandinum sigur, at ætlanin er at skipa fyri eini jubileumskapping í heyst, nú Billardsambandið fylti 25 ár í fjør. Statoil er høvuðssponsor fyri FM-kappingini í ár.